# <nýtt - nýtt>

3arin <nýtt - nýtt>

## Aaliyah



**Heiti:** I Care 4 U
**Skeringar:** 14 + Bonus track
**Plátufelag:** Blackground Records

## Kelly Osbourne




**Heiti:** Shut up
**Skeringar:** 12
**Plátufelag:** Sony Music

## t.A.T.u



**Heiti:** 200 km/h in the Wrong Lane
**Skeringar:** 13
**Plátufelag:** Interscope Records

## The Best




**Heiti:** Air Guitar
Album in the World... Ever!!!
Dupultfløga
**Skeringar:** 21+22
Bólkar: Deep Purple, DAD, Jimi Hendrix Experience, Dire Straits, Foo Fighters, Santana, Gary Moore, Queen, Steppenwolf, Robbie Williams o.s.fr
**Plátufelag:** Virgin Records

## Austin Powers – Goldmember




**Høvuðsleiklutir:** Mike Myers, Beyoncé Knowles og Michael Caine
**Longd:** 91 minuttir
**Prod. ár:** 2002

Tá Austin Powers skal verða gjørdur til aðalsmann av drotningini verður pápi hansara, tann legendariski njósnarin, Nigel Powers, burturflluttur av tí svaka vísindamanninum Goldmember. Tað gerst verri tá faðir metallið, Mefisto, slær seg saman við Dr. Evil og MiniMe við tí einasta endamáli at drepa Austin Powers og sjálvandi yvirtaka verðinsharradømið...

## Murder by Numbers




**Høvuðsleiklutir:** Sandra Bullock
**Longd:** 116 minuttir
**Prod. ár:** 2002

Sandra Bullock hevur ongantíð verið meira orginal ella fangandi enn í leiklutinum sum Cassie Mayweather, ein kriminalhjálpari í drápsdeildini sum berjist við persónligar illar andar, meðan hon skal fylgja sínum instinktum, tá hon skal uppklára eitt morð. Sporini peika ein veg, men ketan av prógvum er eitt sindur ov fullkomin. Vit síggja eisini Ryan Gosling og Michael Pitt í leiklutunum sum tveir ríkir og forkelaðir dreingir, sum neyvt leggja ætlanir um eitt morð og útføra tað. Og harafturat síggja teir løgregluna hopa uppá øll tey plantaðu sporini. Teir halda, at teir eru slopnir, men teir hava ikki tikið fyrilit fyri Cassie Mayweather...

## Bedre end Beckham




**Høvuðsleiklutir:** Parminder Nagra, Keira Knightley og Jonathan Rhys Meyers
**Longd:** 98 minuttir
**Prod. ár:** 2002

Eitt fantastiskt fótbóltstalent, 18 ár og í fótbóltslandinum, Englandi. So skuldi grundarlagið fyri succes verið í lagið. Men ikki fyri Jess. Hon er nevniliga ein genta og indisk. Meðan hon sjálv vil víga sítt lív til fótbóltin, eru foreldur hennara meira áhugað í at fáa hana gifta, so hon kann vera ein góð húsmamma. Betri sær tað ikki út fyri vinkonuna Jules, sum sjálvt um hon hevur evnini, ikki fær gongd á fótbóltskarrieruna. Tað er ikki nóg mikið at kunna sparka ein bólt, sum Beckham. Men tær báðar vinkonurnar taka baradagan upp og stuðla hvør aðrari – inntil tær báðar gerast forelskaðar í fótbóltsvenjaranum Joe...

## Sweetest Thing




**Høvuðsleiklutir:** Cameron Diaz, Christina Applegate og Selma Blair
**Longd:** 87 minuttir
**Prod. ár:** 2002

Tríggjar av heitastu stjørnunum í Hollywood vísa tær, hvussu tú veruliga skalt sláa teg leysan í hesari perluni av einum skemtifilmi.
Christina Walters og veitslugladu vinkonur hennara, Courtney og Jane, eru tríggjar eiggiligar singlegentur, sum elska at ganga í býnum. Á mest ekslusiva diskotekinum í býnum hittir Christina heilt óvæntað Peter, hennara dreymamanni. Næsta morgun uppdagar hon, at hann er farin úr býnum, so saman við Courtney fara tær út á eina villa ferð fyri at finna hann. Men vegurin til tann einasta eina inniheldur nógv yviraskilsir og upplivilsir...






## Aguilera hypnotiserast



Christina Aguilera hevur stórar trupulleikar við rúsdrekka.
Tað letur til, at hon slettis ikki megnar at stýra síni rúsdrekkanýtslu. Og tí hevur ein hypnotisørur sett seg í samband við hana og givið henni eitt tilboð. Og unga sangstjørnan hevur tikið av. Um tað fer at hjálpa henni, tað kann bara tíðin vísa

## Farvæl Frasier



Eftir at hava koyrt í 11 ár, stðegar skemtirøðin Frasier hjá NBC nú. Orsøkin er, at tað ikki loysir seg fíggjarliga at hava hana koyrandi longur.
Partarnir eru nú dýrkaðir upp á 30 milliónir fyri hvønn, samstundis sum hyggjaratalið er dalandi. Tí tóku framleiðararnir avgerð um at steðga tí áður so vælumtóktu sendirøðini.

## Tom Cruise nýggja dámu



Tom Cruise hevur havt úr at gera, síðani hann og Nicole Kidman fóru frá hvørjum øðrum. Og tað hevur ikki bara verið innan arbeiðið. Konufólkini hava eisini verið fleiri í tali. Einaferð var talan um, at tann heilt stóra skuldi vera Penelope Cruz, men tað var tað so ikki kortini.
Tann nýggjasta á skránni fyri tíðina er ein modell, sum eitur Sofia Vergara. Men fjølmiðlar og onnur hava verið skjót at geva henni kelinavnið Sofia Viagra.

## Kiefer Sutherland steðgar tjóvi



Sutherland svav herfyri hjá einum vini. Hann vaknaði á miðjari nátt av einum ella øðrum ljóði, sum kom frá stovuni. Hann setti sær fyri at kanna, hvat hetta var fyri nakað. Áðrenn hann varnaðist nakað stóð hann andlit til andlits við ein tjóv. Hesin tjóvur tók beinini upp á nakkan og ætlaði at flýggja. Men filmstjørnan frá sendirøðini 24 hours takladi hann og helt honum, meðan hann rópti á vinin og bað hann ringja eftir løgregluni, sum løtu seinni kundi handtaka óhepnasta tjóvin í Beverly Hills hetta kvøldið.

## Kate Winslet teldugjørd



Á forsíðuni á enska mannfólkablaðnum GQ komandi mánaða er ein mynd av Kate Winslet, sum er kend frá millum annað Titanic.
Tað er sum so onki løgið í tí, men tað sum er undarligt kortini er, at Kate so at siga ikki er til at kenna aftur. Hon sær nógv klænri út, hevur hægri kinnabein, minni bringu og klænri lør eisini.
So er spurningurin hvat er hent við tí ikki so klønu Titanic stjørnuni. Hevur verið til skurðviðgerð fyri at tapa seg ella hevur fingið anoreksi.
Men svarið er, at Kate Winslet ella Kate "Thinslet", sum hon nú verður kallað, hevur verið upp á ein digitalan slankikur.
Mannfólkablaðið GQ hevur ásannað, at tey hava nýtt teldutøkni til at fáa forsíðugentuna at síggja klænri út. Hon er við øðrum orðum blivin " air-brushed", so hon sær klænri út í andlitinum, um búkin og um lørini. Blaðið sigur, at Winslet hevur góðtikið nýtsluna av teldutøkni, og at øll eru nøgd við úrslitið.
Men Winslet er als ikki samd. Hon heldur slettis ikki, at henda broytingin prýðir hana.
– Broytingarnar eru alt ov umfatandi. Eg síggi ikki og ynski heldur ikki at síggja soleiðis út. Eg havi ikki tapt 15 kilo. Eg eri fullkomuliga tann sama, sum tá eg var til Oscarhandanina í mars í fjør, sigur hon. Tann enska sjónleikarkvinnan hevur tapt seg nógv, síðani hon átti dóttrina Mia, sum í dag er tvey ára gomul, men samstundis hevur hon eisini verið ein av teimum størstu mótstøðufólkunum fyri tí anoreksilíknandi kvinnu-fyrimyndini og hysterinum um allar slankikurar, sum er í Hollywood.
– Kvinnur halda bara, at tær eru sexutar, tá tær eru ordiliga klænar, og tað skilji eg slettis ikki, sigur hon.

## Clooney yvirhálar Beckham



George Clooney hevur væl og virðiliga yvirhálað fótbóltstjørnuna David Beckham úr Manchester United. Beckham var í fjør front figurur fyri eini lýsing fyri Police sólbrillur, har hann kundi fara 30 milliónir ríkari avstað aftur sambært sáttmálanum.
Nú hevur George Clooney fingið fatur á sáttmálanum, og harvið er Beckham vekk. Brillufyritøkan metir Clooney at vera munandi meira áhugaverdan enn Beckham er.

## Tá Meg Ryan fekk hug at gera fimleik



Ein kvinna kann sagtans lata sum um hon fær eina orgasmu. Tað vísti Meg Ryan í filminum " When Harry met Sally ". Men at vera væl fyri og at kroppurin er í góðari venjing, tað kann ein ikki filma seg til.
Tað má Meg hava verið komin í tankar um, meðan hon spákaði til hús frá eini vakurleikaklinikk í Beverly Hills.
Tí har mitt á gongubreytini byrja hon, sum eisini íðkar yoga, at gera fimleik. Frammanfyri øllum teimum bilsnu, sum gingu framvið tveitti 41 ára gamla Meg Ryan seg út í rørslur fyri víðarikomin. Hon vísti seg enntá at vera í standi til at knekka seg so nógv, at høvdið kom niður til føturnir.

## Anastacia kann framvegis vísa sín barm



29 ára gamla sangarindan Anastacia fer framhaldandi at kunna leggja sín barm til flottar lýsingarmyndir, hóast fleiri óndartaðir krabbameinssvullar eru funnir í hennara bróstum. Teir vandamiklu svullarnir vórðu staðfestir so tíðliga, at Anastacia eftir øllum at døma fer at sleppa við eini minni skurðviðgerð og stráluviðgerð. Tað verður eftir øllum at døma ikki neyðugt at taka bróstini, men so skal tað eydnast at skera svullirnar burtur.
– Læknin hjá mær helt fast við, at eg átti at fingið eina mammografi, sum liður í einari rutinukanning, sjálvt um eg helt tað var óneyðugt, sigur Anastacia.
– Hann eigur lívið í mær. Og mínir fjepparir skulu ikki vera ørkymlaðir. Eg eri ein "figthari!"

## Avril er varin við pengapunginum



18 ára gamla kanadiska sangarinnan Avril Lavigne, sum eftir minni enn einum ári er vorðin heimskend, gongur ikki runt og spillir nógva pening sín. Mamma og pápi Avril siga nevniliga, at hon er sera ansin, tá tað kemur til pengar.
"Hon hevur altíð ansað væl eftir sínum pengum," sigur mamma Avril. Pápi Avril greiðir frá, at einaferð hann hevði verið við dóttur síni hjá einum bilseljara, hevði hann til stuttleikar spurt hana, um hon hevði hug at fáa ein convertible bil. Avril var blivin óð og segði: "Babba, eg vil bara hava ein brúktan jeep".
Í mars fer Avril Lavigne á konsertferð í Evropa, og fer vældámda sangarinnan í summar á sína fyrstu konsertferð í Norður Amerika.

## Shakira vil hava frið



Shakira hevur gjørt vart við sína ónøgd um, at USA ætlar at leypa á Irak. Hon heldur tað bara vera ein kapping um vald. Hon samanber kríggið við eitt talvspæl og heldur, at tað bert eru tveir leiðarar í einum vandamiklum spæli. "Teir vilja bara spæla meir og meir, men tað er ikki altíð, at fólkið hevur somu áskoðan sum leiðararnir", sigur Shakira.
"Bumburnar detta ikki á pappfigurar. Tær raka fólk. Tað eru verulig fólk, sum doyggja," sigur Shakira, og tekur eisini sítt egna land sum dømi. "Eg komi úr Kolumbia, sum er eitt land, ið hevur verið rakt av harðskapi í meir enn 40 ár. Eg havi sæð avleiðingarnar av kríggi, og teir sálarligu trupulleikarnir kríggj elvir til í samfelagnum. Eg haldi ikki, at vit nakrantíð eru til reiðar til kríggj."

## topp.10/dvd

01. sweetest thing
02. monsters ball
03. austin powers - goldmember
04. minority report
05. van the man
06. murder by numbers
07. bedre end beckham
08. skulls 2
09. mothman prophecies
10. bad company

## topp.10/cd-rom

01. medal of honor - allied assault
02. battlefield 1942 - road to rome
03. age of mythology
04. delta force - task force dagger
05. warcraft 3
06. roller coaster tycoon 2
07. the sims – deluxe edition
08. sea dogs
09. morrowind - the elder scrolls
10. total club manager

## topp.10/fløgur

01. eminem: 8 mile
02. t.a.t.u - 200 Km/h in the wrong...
03. robbie williams - escapology
04. ymiskt - now 2
05. avril lavigne - let go
06. ymiskt - re:play dance mania
07. ymiskt - the very best of mtv...
08. eminem - the eminem show
09. ymiskt - big hits 2002
10. elton john - greatest hits

## topp.10/video

01. sweetest thing
02. austin powers - gold member
03. monsters ball
04. showtime
05. 40 days and 40 nights
06. men in black 2
07. terror i høj fart
08. the last castle
09. out cold
10. unfaithful

3arin